Kappingareftirlitið
FAROESE COMPETITION AUTHORITY

Hansen & Thomassen Advokatfirma
Postsmoga 106
110 Tórshavn

**Att.: Annfinn V. Hansen, adv.** **Tórshavn 2. september 2013**

Journal nr.: 13/00240-3
Viðgjørt: S.R.

**Góðkenning av yvirtøkuni hjá SF IV slhf av 66% av partapeninginum hjá P/f Magn**

Kappingareftirlitið fekk tann 21. august 2013 fráboðan um, at SF IV slhf. hevði í umbúnað at yvirtaka ognarlutin hjá íløgufelagnum Hedda í føroyska oljufelagnum P/f Magn. Fráboðanin var fullfíggjað sama dag.

Talan er um eina yvirtøku sambært §13, stk. 1 nr. 2 í kappingarlógini, tí ræðisbroyting fer fram. Við yvirtøkuni av ognarlutinum fær SF IV slhf. fult ræði á P/f Magn.

Yvirtøkan kemur undir fráboðanarskylduna í §16, stk. 1, tí markvirðini í §14, stk. 1, nr. 2 eru nádd. Sambært §14, stk. 1, nr. 2 skal minst ein fyritøku hava ein umsetning á 75 mió. kr. í Føroyum, meðan onnur fyritøka skal hava minst 75 mió. kr. á heimsstigi. P/f Magn hevur ein umsetning í Føroyum, sum liggur omanfyri føroyska markvirði, meðan feløgini handan SF IV slhf. hava ein umsetning, sum liggur omanfyri globala markvirðið. Yvirtøkan er fráboðað í Føroyum og Íslandi.

P/f Magn er eitt av tveimum feløgum á føroyska brennievnismarknaðinum. Felagið hevur áleið ein helming av føroysku kundunum. Umframt sølu av brennievni selur P/f Magn eisini aðrar oljuúrdráttir. Seinastu árini er umsetningurin av øðrum vørum, so sum matvørur og góðgæti øktur nógv.

Talan er um eina yvirtøku, sum kemur undir §3, stk. 1, nr. 4 í reglugerð nr. 2 frá 20 juli 2012, og er tí fráboðað eftir einfaldum leisti. Við støði í teimum upplýsingum sum fráboðari er komin við, metir Kappingareftirlitið, at yvirtøkan ikki gevur orsøk til ivasemi, og hevur tí avgjørt at góðkenna yvirtøkuna eftir einfalda málsviðgerð, sbrt. § 15, stk. 5 í kappingarlógini.

Góðkenningin er givin treytað av, at tær upplýsingar sum luttakandi fyritøkurnar hava givið eru rættar, sbrt. § 18a , stk. 3 í kappingarlógini.

Vegna

Kappingareftirlitið

Terje Sigurðsson
deildarstjóri

Sigurd Rasmussen
fulltrúi

Skálatrøð 20 · P.O. Box 73 · FO 110 Tórshavn · Faroe Islands · Tel +298 35 60 40 · Fax +298 35 60 55 · kapping@kapping.fo · www.kapping.fo